United World College

The Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum studentaskúlanæmingi, ið hevur lokið 1. s, at taka IB (International Baccalaureate, ið er altjóða studentsprógv), eftir 2 árum í einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðanfyri Bergen.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr 60 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Føroya Landsstýri rindar skúlagjaldið, og næmingurin, ið fer á United World College, fær stuðul frá Stuðulsgrunninum eftir somu treytum, sum studentaskúlanæmingar í Føroyum.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Landsskúlafyrisitingina.

Umsókn um upptøku á The Red Cross Nordic United World College, ljóstak av støðumetum, umframt stutt frágreiðing um teg sjálva/n skulu vera Landsskúlafyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. apríl 1996.

28. mars 1996

Landsskúlafyrisitingin

Útbjóðing

Uttandura málaraarbeiði fyri 1. byggistig á Berjabrekku verður við hesum útboðið í almennari lisitatión, millum málarameistarar við bústaði í Føroyum.

Samlaða flatan, ið skal málast, er um 3.500 fermetrar.

Arbeiðið er ætlað at byrja fyrst í viku 18 1996 og vera liðugt seinast í viku 30 1996.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá undirritaða og verður útflýggjað týsdagin 09. apríl 1996.

Tilboðini verða merkt »Málaraarbeiðið, Berjabrekka 1. byggistig« og skal verða aftursend í afturlatnum brævbjálva áðrenn lisitatiónina, sum verður á teknistovu hjá undirritaða mánadag 22. apríl 1996, kl. 16.00. Teir bjóðandi kunnu tá vera hjástaddir.

Vegna nevndina í 1. byggistigi á Berjabrekku:

Janus Sorensen, arkitektur maa
Varðagøta 73
FR-100 Tórshavn
Tlf.: 16295

Haldið **sosialin**

Viðmerkingar

Røtt javnvág trupul at finna

Í Dimmalætting hin 16 mars spyr »forvitin«, um vit á Oljufyrisitingini hava kalkulerað við nøkrum tølum, sum siga, hvat landshúsarhaldið fær av inntøkum av avgjøldum frá »oljuni« Spurningurin tekur støði í nøkrum inntøkutølum úr Hetlandi og Bretlandi.

Spurningurin er sjálvandi ógvuliga áhugaverdur, men hann er ikki heilt lættur at svara í stuttum. Til tað er orðið olja í hesum sambandi ov víðfevnandi. Heldur ikki er tað so líkatil at sammeta Hetland og Føroyar í hesum sambandi.

Ein høvuðsmunur millum Hetland og Føroyar, tá hugsað verður um »olju«, er, at oljuleiting og oljuútvinning hevur verið ein veruleiki kring Hetland í eini 25 ár. Eingi verulig oljuleiting er enn byrjað kring Føroyar. Ein annar høvuðsmunur er, at hetlendingar ikki hava nakran myndugleika yvir ráevnum í undirgrundini har, London-stjórnin hevur alt valdið í so máta.

Lógar- og umsitingarvaldið yvir ráevnum í tí føroysku undirgrundini varð sum kunnugt yvirtikið til føroyskt sermál í 1992. Í september 1993 samtykti Føroya Løgting, at farast skuldi undir fyrireikingar við tí í hyggju at geva loyvi til at leita eftir og at útvinna olju og jarðgass úr føroysku undirgrundini.

Ein oljuverkætlan kann býtast upp í ymisk skeið:

1 Forkanningar,
2 Leiting og meting,
3 Útbygging og framleiðsla, og
4 Endi

Møguleikarnir fyri inntøkum til landshúsarhaldið eru ikki teir somu í teimum fýra skeiðunum.

Forkanningarskeiðið

Hetta skeiðið byrjaði hjá okkum fyri tveimum árum síðani. Endamálið er at fáa eina hóming um tey jarðfrøðiligu viðurskiftini í undirgrundini. Eingi loyvi verða her givin til veruliga oljuleiting ella framleiðslu, og tí eru ongar inntøkur, men bert útreiðslur knyttar at hesum skeiði fyri oljufeløgini.

Inntøkumøguleikarnir hjá myndugleikunum eru eisini ógvuliga avmarkaðir. Feløgini, ið ynskja at gera kanningar, skulu gjalda eitt lítið umsóknargjald (10 000 kr.) og eitt árligt loyvisgjald (75 000 kr.). Til tey fyrstu loyvini, ið givin vórðu (Western 1994 og 1995, og World Geoscience 1995 og 1996), vórðu sett nøkur serlig krøv, sum m.a. merkja, at landskassin fær nakrar inntøkur, ið ikki eru vanligar aðrastaðni í sambandi við forkanningar. Samanborið við inntøkumøguleikarnar í tilknýti til oljuframleiðslu eru inntøkurnar her tó ógvuliga avmarkaðar, nakrar heilt fáar milliónir krónur árliga.

Leiting og meting

Eftir ætlan skal Oljuráðleggingarnevndin lata landsstýrinum eina frágreiðing komandi summar við tilmælum við atliti at einum komandi oljuleitingarskeiði og møguligum seinni oljuútvinningarskeiði og endaskeiði. Í sambandi við sjálvt leitingarskeiðið fevna tilmælini um ymiskar spurningar, so sum hvørki øki bjóðast skulu út til oljufeløgini at gera leitingar á, trygdar- og umhvørviskrøv, fyrilit mótvegis fiskivinnuni v.m., nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum tænastum o.a.m. og eisini beinleiðis peningaspurningar, so sum umsóknargjøld, loyvisgjøld, møguliga økisleigu v.m.

Beinleiðis inntøkurnar til landskassan verða í hesum skeiðnum heldur ikki tær stóru, í mesta lagi nakrar fáar tiggjutals milliónir krónur um árið.

Útbygging og framleiðsla

Til hetta skeiðið er fyrst at siga, at ógvuliga óvist er, um og nær eitt tílíkt skeið kemur upp á tal. Til tað krevst, at olja verður funnin í nóg stórum nøgdum, so at tað peningaliga kann loysa seg at fara undir hetta ógvuliga útreiðslukrevjandi skeið. Bert útbyggingin av eini oljuleið kann kosta fleiri milliardir krónur, og farið verður bert undir hetta, um oljufeløgini, ið gjalda skulu, og myndugleikarnir, sum jú í útgangsstøðinum eiga ráevnini í undirgrundini, síggja sær ein fyrimun í tí.

Longu í síni frágreiðing til landsstýrið komandi summar skal Oljuráðleggingarnevndin m.a. geva tilmæli um skatta- og avgjaldsspurningar hesum viðvíkjandi. Enn er ov tíðliga at siga, hvørji tilmæli verða givin, og sjálvandi eisini, hvørjar avgerðir ið tiknar verða av okkara landsstýri og løgtinginum.

Verður olja funnin í nóg stórum nøgdum, er tað tó hugsandi, at beinleiðis inntøkurnar til landskassan frá hesum skeiðnum kunnu gerast stórar, kanska fleiri hundraðtals milliónir krónur ella meira um árið.

Endi

Tá hildið verður uppat við útvinningini frá eini oljuleið, skulu tey avvarðandi oljufeløgini rudda upp eftir seg á staðnum. Hetta skeiðið ber tí aftur nakrar útreiðslur og ongar inntøkur við sær fyri oljufeløgini. Tí er tað heldur ikki hugsandi, at myndugleikarnir kunnu fáa nakrar serligar inntøkur burtur úr hesum virkseminum.

Sum tað sæst, so er tað í sambandi við eitt møguligt oljuframleiðsluskeið, at tað føroyska landshúsarhaldið fær møguleika fyri at fáa inntøkur, ið veruliga muna. Oljufeløgini noyðast sjálvandi frá byrjan at vita rættiliga neyvt, hvørji avgjøld og skattir v.m., ið føroysku myndugleikarnir fara at áleggja teimum, um tey ætla sær undir at framleiða olju. Teirra avgerð frá fyrsta degi um at nýta kreftir og pening á einum fyri tey nýggjum og ókendum øki sum tí føroyska, verður tikin við tí fyri eyga at fáa ein nettovinning burturúr samanlagt. Teirra metingar hesum viðvíkjandi eru sjálvandi nær knyttar at oljuvánunum á økinum, men eisini at teimum treytum, sum myndugleikarnir seta. Um til dømis skatta- og avgjaldstreytirnar tykjast teimum ov tyngjandi, velja tey helst frá byrjan at lata vera við at søkja um leitingarloyvi. Um myndugleikarnir harafturímóti seta so linar treytir, at lítið og einki fæst burturúr fyri samfelagið, skuldi eingin grund verið hjá okkum at sett nakað virksemi í gongd.

Torføra uppgávan hjá myndugleikunum frá byrjan er tí at royna at finna ta røttu javnvágina, ið fær oljufeløgini at velja at gera íløgur í oljuleitingar v.m. á okkara øki fram um onnur, og sum samstundis gevur okkara samfelagi sum mest burturúr, peningaliga eins og á annan hátt.

Oljufyrisitingin
26. mars 1996
Martin V. Heinesen

PIZZA-VINIR

Hevur tú hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** inn á gólvið, so ring **tlf. 18866**, og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina.
Hetta tilboð er tó bert galdandi fyri viðskiftafólk í Tórshavn

Vit vóna, at hetta tilboð kemur væl við.

PIZZARIA
Tlf. 18866